Trý norsk farmaskip

Undir føroyskt flagg

Astor og Arunto eru longu skrásettir í føroyska farmaskipaflotanum og fara at sigla undir føroyskum flaggi í næstu viku. Hetta hóast vit enn onga altjóða skipaskráseting hava fingið.

Meðan føroysk farmaskip fara undir útlendskt flagg at sigla, loysir tað seg eftir øllum at døma hjá útlendskum skipum at koma hendavegin.

Norsku farmaskipini Astor og Arunto úr Haugesund eru nú skrásett í Føroyum. Tey fara undir føroyskt flagg at sigla í næstu viku. Skipini eru millum 3 og 4 túsund tonns stór, og sigla við farmi í Noreg og Svøríki.

Vil einki siga

Hetta upplýsir Tórleif Mikkelsen stjóri á partafelagunum Bulkskip í Havn, sum eigur skipini.

Longu í komandi viku verður eitt farmaskip aftur skrásett í føroyska farmaskipaflotanum. Hetta er farmaskipið Austvik, sum sama partafelag eigur.

Hví skipini eru skrásett í Føroyum, vil Tórleif Mikkelsen ikki siga nakað um.

Landstýrið hevur arbeitt við eini lóg um føroyskari altjóða skráseting av farmaskipum (FAS). Lógaruppskotið skuldi eftir røttum verið liðug til 1. oktober, men er ikki klárt enn.


Áhugaverd skráseting

Á norska reiðarínum Storesund í Haugesund vilja teir heldur einki siga um hví tey trý skipini eru farin undir føroyskt flagg.

- Útlit vóru fyri eini áhugaverdari føroyskari altjóða skráseting, er tað einasta stjórin á Storesund, Arne Storesund ynskir at upplýsa.

eyð

Meðan føroysk farmaskip fara undir fremmant flagg koma onnur hendanvegin. Hví norsku skipini koma áðrenn vit fáa eina FAS-skipan, vil reiðarin, Tórleif Mikkelsen, ikki siga



Marinustøðin 40 ár

1. september vórðu 40 ár liðin, síðan Marinustøðin byrjaði.

Tað var í 1951, at danska sjóverjan í Føroyum fekk sær sæti í eini barakk við Hoyvíkstjørn, sum tá lá uttanfyri Havnina. Tá vóru bara 12 mans á støðini.

Húsið, sum Marinustøðin nú hevur, varð bygt í 1964. Sama ár varð føroyska sjómarkið víðkað út á 12 fjórðingar og hetta økti um arbeiðið hjá sjóverjuni. Í 1977 varð sjómarkið aftur víðkað, til 200 fjórðingar.

Arbeiðsuppgávurnar hjá Marinustøðini eru øktar støðugt. Nú starvast 36 mans á Marinustøðini.

Helst børn

Óivað eru tað børn, sum hósnáttina brutu inn í Aldubáruna, eina kiosk í Havn.

Góðgæti og kanska nakað av sigarettum er horvið.

VIT ERU Á SØLU-STEVNUNI





Vit halda, tú ert búgvin ...

SJÓVINNUBANKIN



.. at fáa eitt álit latið upp í hendurnar, har tú kanst avgera og stýra, hvussu tínir egnu pengar koma og fara.

STJØRNUKONTO
-nýtt tilboð til tín

Nú hevur tú møguleika at stovna eina Stjørnukonto og fáa eitt Stjørnukort, ið gevur tær atgongd til sjálvtøkur og avgreiðslur bankans.

Ert tú millum 13 og 20 ár ?

Stjørnukonto er eisini eitt álit.
Hon er eitt stig á leiðini, tí tá tú verður 18 ár, kann hon gerast til eina FR/VISA konto.
Stjørnukonto er ein uppsparingarkonto við hægstu innlánsrentu - samstundis sum tær stendur frítt í boði at taka út pening, sum tú vilt.

Soleiðis er tað at hava Stjørnukonto í Sjóvinnubankanum